**Aksel V. Johannesen** **Nr. 61/2019**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a**

**Fyrispurningur um samsýning til fosturforeldur, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS §52 a).**

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu høg samsýningin til fosturforeldur er í løtuni?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu høg samsýningin var í 2009?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at prístalsjavna samsýningina?

**Viðmerkingar:**
Tíverri eru tað ikki øll børn í Føroyum, sum hava umstøður til at búgva heima hjá foreldrunum. Í summum førum meta myndugleikarnir, at børn hava best av at verða tikin úr heiminum hjá foreldrum ella verjum í styttri ella longri tíð. Men tíbetur eru tað fleiri fosturforeldur, sum bjóða seg fram at veita hesum børnum eitt gott og trygt heim. Í hesum sambandi hava vit eina fosturforeldraskipan, sum syrgir fyri, at barnið fær eina góðkenda fosturfamilju.

Hesi fosturforeldur gera eitt stórt arbeiði bæði fyri børnini og samfelagið. Talan er um eitt starv, sum ikki bara er fulla tíð, men alt samdøgrið. Fyri at átaka sær hesa uppgávu fáa fosturforeldrini eina samsýning. Spurningurin er, um samsýningin samsvarar við ta ábyrgd, sum fosturforeldrini átaka sær, ella um tíðin er komin til at eftirmeta samsýningina. Við pensjónsnýskipanini hjá undanfarnu samgongu varð eftirlønargjald lagt oman á samsýningina til fosturforeldur. Hetta er helst einasta broyting, sum er gjørd hesum viðvíkjandi síðan 2009. Síðan tá eru bæði lønar- og kostnaðarstøðið vaksið nógv í síni heild. Tí er tað rímiligt at seta spurnartekin við, um samsýningin í dag stendur mát við lønar- og kostnaðarstøðið í samfelagnum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 5. mars 2020**

Aksel V. Johannesen